## Viðmerking:

# 15 præster – og igen

I Sosialurin d. 24/5-2000 kunne vi læse, at 15 præster gik ud og offentligt bad de danske biskopper om undskyldning. Det må I 15 kunne gøre bedre.

**En undskyldning til de fire præster**

De færøske præster er **ikke** blevet forespurgt, om de ønskede en af de besøgende biskopper som prædikant i en af deres kirker. De færøske præster fik en liste over, hvor de udenlandske gæster skulle prædike, og fik besked på, at hvis det ikke kunne lade sig gøre, så skulle de give besked. De blev ikke bedt om at sige »ja, tak« til et tilbud, men de kunne sige »nej, tak« til biskoppens planlægning. Den mulighed benyttede nogle af præsterne sig så af. Hvorfor skal de dog udleveres til spot og spe, fordi de benyttede denne mulighed? Det var biskoppen selv, der gav dem denne mulighed. Biskoppen skrev endda tilbage til dem, at det blot var **et tilbud**, og at han tog deres svar til efterretning. Biskoppen kunne, som han tidligere har gjort, sætte præsterne ud af spillet ved at fratage dem muligheden for at sige »nej, tak«. Det var dog godt, at den lokale præst denne gang fik lov til at virke som det, han er kaldet til af menigheden, nemlig hyrde.

Siden udleverer biskoppen selv præsternes svar på hans brev til pressen og kommenterer deres svar offentligt. Dermed blev sagen offentligt diskussionsemne. Enhver præst på Færøerne må altså svare på breve fra sin biskop i bevidstheden om, at hvad han svarer biskoppen, kan han risikere bliver udleveret til medierne og kommenteret offentligt af biskoppen og gjort til offentligt diskussionsemne i medierne. Her er en undskyldning fra biskoppen på sin plads til disse præster. At 15 præster akcepterer en sådan behandling af deres kolleger er uforståeligt. Her er en undskyldning fra de 15 til deres kolleger på sin plads. At de 15 præster lidt



nedladende reducerer de 4 præsters embeder til 2 kirker, skønt de er præster ved 12 kirker og 14 menigheder, og sætter den ene præst i parantes, må vække undren.

**En undskyldning til biskopperne**

Naturligvis skal nogle af de danske biskopper have en undskyldning. Det manglede bare. Spørgsmålet er blot. Hvem skal give denne undskyldning? Det kan ikke være de fire præster, I nævner, og på hvis vegne I træder frem og undskylder. De fire præster har blot handlet efter Guds Ord og deres præsteløfte. Biskoppen bør give en undskyldning til de implicerede biskopper.

Enhver af os ville også føle os meget dårligt behandlet, hvis vi var blevet indbudt til at prædike, og venligt havde sagt ja, og derefter skulle opleve at blive udleveret, som det er sket. Men det er ikke præsternes skyld, for de har ikke inviteret nogen biskop til at prædike. Derfor var det reelt og præcist af biskop Karsten Nissen, da han i Femmeren de. 24/5-2000 adresserede kritikken til den færøske biskop.

**Hvor er hyrderne?**

En hyrde skal beskytte fårerne mod fare. Ifølge Guds Ord er homoseksuelt samliv synd (Rom. 1), og syndens løn er døden (Rom. 6). Den, der siger god for synd, spreder død. De danske og svenske biskopper spreder død i deres kirker, når de legitimerer homoseksuelt samliv. De spreder død i fåreflokken. En sand hyrde vil beskytte sine får mod sådanne, der spreder død. Men 15 præster har nu offentligt undskyldt, at andre præster vi beskytte deres får, og har offentligt sagt, at det er en ære, at få disse biskopper ind i fåreflokken, og at de er mere end velkomne blandt de får, de selv skulle være hyrder for. Det 15 har med deres erklæring sagt, at det er i orden, at en biskop står for det, de danske biskopper står for. Man kan sagtens være biskop, lære som de danske biskopper lærer, indføre, hvad de indfører, og alligevel virke som prædikant. Dermed siges der ja til, at der i vores kirke læres som disse biskopper lærer. Netop deres lære var jo grunden til, at de fire sagde »nej, tak«. Denne begrundelse har de 15 erklæret ugyldig, og dermed åbnet porten på vid gab for legitimering af homoseksuelt samliv og kirkelig markering af registreret partnerskab. Stakkels menigheder.

**Høflighed**

At gøre præstens hyrdeforpligtelse til et spørgsmål om høflighed er det samme som at afskaffe hyrdeforpligtelsen. De præster, der har sagt »nej, tak«, kender uden tvivl alt til folkeskik og høflighed, og var en af de danske biskopper kommet på besøg på Færøerne, havde de uden tvivl gerne givet dem en seng, bespist dem med alle de færøske specialiteter, og vist dem rundt på Færøerne. Men det er noget ganske andet end at være høflig mod synd. Det er ganske enkelt synd, at lukke dem, der spreder død, ind i fåreflokken.

Man kan som David angre, dét, man har gjort. Gør en enkelt af jer det, så sig det, så vi kan høre det og tilliden kan genopretts.

Det skulle siges, nu er det sagt.

**Peter O.K. Olofson**
**Klaksvig 25/5-2000**

# Danir upplýsa um Føroyar

Um ein føroyingur skrivar til donsk bløð og er fyri fullveldi, kemur tað ikki í. Hetta hava fleiri sagt mær. Sjálvur havi eg ikki roynt tað, tí eg havi hildið tað vera nyttuleyst at siga frá støðuni, sum eg og meira enn helmingurin av fólkinum síggja hana. Flestu danir vita einki um Føroyar, uttan tað at Føroyar kosta teimum nógv og gevur teimum nógvar kvalir. Hinir hava eitt glansbílæt, har danir eru gávumildir einglar og føroyingar fittir óvitar.

Sum Jóannes Patursson segði á ólavsøku 1946 við H. D. Joensen: »Teir vilja bara eiga okkum sum kúgv á heimabeiti«. Jú, okkurt kemur í, men tá má ein fittur partur av greinini høgga niður á føroyingar ella sleikja fyri dønum.

Dimma skal takkast fyri, at hon í nr. 93 prentar grein eftir sjálvan blaðstjóran á Politiken, Tøger Seidenfaden: »Det færøske landsstyre kan ikke tages alvorligt«. »Jeg kender ikke meget til Færøerne« byrjar hann og viðgongur, at tað er, »en spændende og værdifuld del af det land jeg lever i«, og so tað vanliga at vilja føroyingar hava frælsi, skulu teir fáa tað. At enda, aftan á at hava niðurgjørt landsstýrið biður hann okkum: »Og lad så være med at plage os«.

Fyrst í mai hevur Weekendavisen stóra grein, Uhellig alliance, skrivað av tí høgravenda (av slagnum frá kalda krígnum) Ulrik Høy. Hann hevur funnið ein føroying, Virgar Dalsgaard, sum hevur verið 40 ár í Danmark, at vera tøkan tápuling ella glaðbeintan frásøgumann. Og tað er ikki hissini frásgnir teir borðreiða við: »Hoydal-dynastiet«, um Kjartan Hoydal, pápa Høgna, og beiggjan Gunnar Hoydal. Onnur sleppa eisini upp í part, t.d. Z. Wang og Jóanes Nielsen. Um Høgna Hoydal verður ikki sagt tað nógva, men tað er hann, teir vilja ráma og fullveldisætlanina. Vit fáa sjálvandi at vita, at hann er føddur í Danmark, og at hann hevur lisið har, at øll hansara barna- og unglinga skúlagongd hevur verið í Føroyum, hevur ongan áhuga. Áhugavert er, at Karsten Hoydal ikki verður viðgjørdur. Jú, at lesa hetta er sum fyrr í tíðini á bygd, tá ið menn brigsl-aðust. Síðst í greinini kemur tó spurningurin (kanska ætlað sum rosinan í pylsuendanum): »Har Høgni Hoydal også været betaget af kommunisterne?« Ja, han har også været der og var glad for det«. Eg tími ikki at viðgera greinina meir. Hon er tað ikki verd, men satt at siga, hevði eg ikki trúð, at eitt danskt blað, sum nógv halda vera besta ella næstbesta blað danir eiga, kemur sær at fylla eina heila síðu við tílíkum tvassi. Ein av okkara skilagóðu landsmonnum sendi blaðnum eina lítla síðuliga rættleiðing, men hon kom sjálvandi ikki í. Nei, vit mugu ikki bara fáa fullveldi, men reint lýðveldi, republik. Sjálvandi skulu vit gera hesar samráðingarnar lidnar, men longu nú fyrireika samráðingar á hægsta stigi við okkara næstu grannar: Skotland, Ísland og Noreg. Hinumegin Oyrasund liggur tað framkomna Svøríki. Hesi lond eru minst líka framkomin sum Danmørk. Hví fara yvir um ánna eftir vatni? Hasi sekshundrað árini kunnu ikki brúkast til tað nógva. Teir 20.000 føroyingarnir, sum hava valt ella líðandi fest røtur har,



ráða vit ikki fyri. Hvussu danir fara við teimum, ráða teir fyri. Hatta var enn eitt ljótt útspæl av teimum fyri at ræða. Lágt ríða teir. Annars haldi eg, at landsstýrið eigur at fáa teir at siga okkum, hvussu teir eru skrásettir, og hvønn teir skráseta sum føroying ella gita teir bara?

Fyri góðum hálvum ári síðani kom ein av mínum yngru vinmonnum til mín og spurdi, um eg kendi Virgar Dalsgaard. Mítt svar var: »Eg havi ongantíð hitt hann, men hoyrt skilafólk siga onkra ótrúliga søgu um mannin. Tá ið eg so spurdi meir, fekk eg altíð svarið: »Honum sigst ikki frá, hann skal upplivast««.

Maðurin hevði verið til onkran politiskan fund í Føroyahúsinum, har Virgar hevði havt orðið og millum mangt annað umrøtt meg sum kommunist. Hann hevði hildið mannin antin vera ávirkaðan av drøgg ella sansaleysan. Nú skilt hann alt betur. Tað man Ulrik Høy eisini hava skilt, men hann hevði brúk fyri einum tøkum tápulingi.

**Steinbjørn B. Jacobsen**




# Stórt tiltak á Kambsdali leygarkvøldið

*Á skránni verður mótasýning, stórt diskotek og dansur við nýggja føroyska bólkinum All That Rain*

Tað er Gøtu Ítrottarfelag, sum skipar fyri spennandi tiltakinum, sum Ítrottarhøllin á Kambsdali verður karmur um leygarkvøldið 27 Mai.

Dyrnar lata upp klokkan ellivu. Fyrst á skránni er spennandi mótasýning við handlunum Jungmann og Shop Inn. Eftir mótasýningina verður stórt diskotek og dansur við bólkinum All That Rain við manning úr Kjølum.

All That Rain sóu dagsins ljós eftir at Kjølar góvust at spæla. Sangarin í Kjølum, Signar Í Homrum avgjørdi at búseta seg í Svøríki, og var tað tískil rættiliga ómøguligt at halda fram við bólkinum. Henning Nicodemussen, Jens Tummas Ness og Jens Marni Hansen, ið vóru hinir limirnir í Kjølum, fingu tí hug til at royna okkurt nýtt.

Í All That Rain eru somu limir sum í bólkinum Sjey, ið var ein frítíðarbólkur hjá Henning, Jens Marna og Jens Tummas, meðan teir framvegis spældu við Kjølum. Hesir plagdu at spæla til ymisk smærri tiltøk, tá sangarin ikki var heima. Nú tá Kjølar ikki spæla longur, hava gomlu limirnir avgjørt at ogna alla sína tíð til nýggja bólkin

Stóra gjøgnumbrotið hjá All That Rain, kom tá bólkurin fekk møguleika at royna seg sum upphitingarbólkur til Tv-2 konsertina, sum var hildin í høllini á Hálsi fyrr í ár. Til hesa konsertina prógvaði bólkurin veruliga hvør dugur er í teimum. Tónleikurin hjá All That Rain er, eins og hjá Kjølum, heimagjørdur, og tað eru limirnir sjálvir, sum skriva orð og løg.



## HYGG & HOYR

**Fríggjadagur 26. mai**

# Útvarpið á netinum

*Eins og eitthvørt virki við virðing fyri sær sjálvum, hevur Útvarp Føroya eisini sína heimasíðu, har upplýsingar av ymsum slag eru at finna*

Jákup Mørk

Eftir at hava trýst seg inn á slóðina, www.uf.fo, kemur tú til framsíðuna, haðani til ber at velja seg inn á hópatals slóðir.

Er ivamál um, hvussu skráin er, fæst hetta at vita, eins og seinastu tøl frá V4 dráttinum, kunngerðir av ymsum slag og onnur praktisk geramál.

Hesar slóðir eru kanska meira ella minni sjálvsagdar, men harumframt eru eisini fleiri áhugaverdar slóðir, sum kanska ikki eru so vanligar á øðrum heimasíðum.

**Síðurnar fylgja sendingunum**

Ein partur av hesum áhugaverdu slóðum eru heimasíðurnar hjá ymsu sendingunum.

Tað, sum kanska er serliga stuttligt við hesum síðum er, at tær í stóran mun eru settar upp í tráð við andan í ymsu sendingunum.

Verður tildømis farið inn á náttarravnarnar, er nógv fjant og fjas at velja ímillum. Hetta skal ikki skiljast á negativan hátt, men heldur soleiðis, at skráin í náttarravnunum er av tí heldur léttara slagnum, og at heimasíðan er gjørd heilt í tráð við hetta. Sjálvandi við svartari bakgrund og einum ravni á síðuni.

Verður tosað um popputar síður, er síðan hjá Vaglinum tó klárt nummar eitt hjá Útvarpinum. Fyrsta ein brennir seg inn í, er ein meiningakanning, har spurt verður um, hvør skal verða komandi løgmaður í Føroyum.

Kanska í sjálvum sær ein ógvuliga seriøsur spurningur, men valmøguleikarnir fyri hesum boða frá øðrum. Bill Clinton og Jacob Haugaard eru millum møguligu valevnini, og so er linjan líkasum løgd.

Aðrar sendingar, so sum lurtararnir og vit, Hvat nú og Crescendo, hava eisini heimasíður, sum eru settar upp í tráð við innihaldið, og yvirhøvur er hesin stílurin ógvuliga gjøgnumførdur.

Lættast hevði kanska verið at sett allar síður upp á sama hátt, men talan er jú um ymsar lurtarar, sum leita sær inn á ymsu slóðirnar, og yvirhøvur tykist hetta vera ein sera væl eydnað roynd hjá Útvarpinum.

**Alternativir møguleikar**

Umframt omanfyrinevndu síður hjá ymsu sendingunum, so eru eisini aðrir møguleikar, sum heldur ikki eru so vanligir at síggja á vanligum heimasíðum, men sum hinvegin kanska heldur ikki eru so neyðugar at hava hjá øllum.

»Hvat heldur tú« gevur lurtarunum møguleika at siga sína hugsan um Útvarpið, og hvør veit, um hetta ikki verður tikið til eftirtektar.

Eisini er ein kanning um hoyrilíkindini, og hetta, saman við omanfyrinevnda valmøguleika, má í øllum førum takast sum greitt tekin um, at stovnurin ikki bert nýtir heimasíðuni til at kunna umheimin um virksemi stovnsins, men hinvegin eisini roynir at aktivera persónarnar, sum koma inn á síðuna.

Sostatt kann Útvarpið eisini fáa stóra gleði av heimasíðuni, við tað at áhugaði á hesari hava møguleika at greiða frá, hvussu teirra fatan av útvarpinum er, og hvørji øki tey meta eru týdningarmikil hjá stovninum at betra.

**Lurtið á netinum**

Er neyðuga telduútgerðin tøk, ber so sanniliga eisini til at lurta eftir tíðindunum á netinum.

Tað er jú ikki altíð, at tað er gjørligt at vera við útvarpstólið júst um tað mundið, tá tíðindasendingarnar fara í luftina, og í so máta er hetta ein ógvuliga hentur møguleiki

Harumframt er hetti uttan iva ein sera hentur møguleiki hjá útisetum, og teimum sum annars eru stødd uttanlanda, tí tey tá kunnu fylgja við gongdini her heima.

Alt í alt er talan um eina heimasíðu, sum røkkur um nógv endamál, uttan at alt verður ov útvatnað av teirri orsøk. Og kanska týdningarmest av øllum, so gongur tað hampuliga skjótt fyri seg at koma víðari, tá ein trýstir á slóðirnar, soleiðis at bíðitíðin, sum aloftast er rættiliga irriterandi ikki gerst alt ov drúgv, tá skift verður millum síðurnar.







ÚTsjón er ikki við hesa vikuna – tað verður aftur í næstu viku